# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Nýggj virði

Talan um virði er nýtt fyribrigdi í føroyskum politikki. Valstríð hava í áratíggjur snúð seg um undirstøðukervi, fiskivinnupolitikk, og síðan 1998 hevur fullveldi eisini verið á skránni. Víst fekk Javnaðarflokkurin sítt gjøgnumbrot í 1958 við lyftinum um fólkapensión, men tað, sum setti dagskránna eftirfylgjandi var undirstøðukervi, endurnýggjan av fiskiskipaflotanum og fiskiveiðirættindi. Politisk og mentanarlig rák uttanlanda, serstakliga í Norðurlondum, síggjast mangan skjótt aftur í Føroyum. Eitt áhugavert dømi er danski forsætisráðharrin Anders Fogh Rasmussen, sum byrjaði við at proklamera minimalstatin, altso ein stat uttan bleyt virði yvirhøvur, fyri nøkur ár seinni at enda við at reka valstríð við bleytum virðum í skildri. Hetta hevur nakað at gera við at vera í pakt við tíðaranda og tíðarrák. Fogh er tikin úr leikum sum taktikari og megnar hetta at skifta ideologi sum onnur skifta stúku væl at merkja uttan at missa meira av sínum trúvirði enn, at hann kann halda fram og gerast longst virkandi forsætisráðharri hjá Vinstra. Her hjá okkum eru nú allir flokkar samdir um, at bleyt virði eiga at standa ovaliga á politisku dagsskránni.

Tað er valla nakar, ið ikki fegnast um hetta skifti í føroyskum politikki. Tað er ivaleyst vælgerandi hjá mongum at sleppa undan at hoyra um tunnlar, flogvallir, tilfeingisrentu og hvat eyðkennir eitt føroyskt valstríð, tá hetta ikki snýr seg um fullveldi. Men hvørji eru so bleytu virðini? Hvussu lýsa flokkarnir hesi virði og hvørji virði raðfesta teir. Tað er ein áhugaverdur spurningur, ið veljarin ivaleyst setur sær sjálvum í hesum døgum. Um mett verður eftir tí vælfyriskipaða valfundinum í Trongisvági, snýr hetta hugtak seg um útbúgving, vælferð sum heild og serstakliga um tilboð innan heilsu- og almannaverkið. Valstríðið hevur avdúkað, at her er stórur tørvur á broytingum til tað betra, serstakliga har talan er um tilboð til børn við ymsum brekum, eftirlønarspurningar og heilsuverkið. Her er ivaleyst tørvur á nýggjum raðfestingum og mangt bendir á, at ABC samgongan, um henni skal vera lív lagað eftir eitt val, má ásanna hendan tørv, skal hon varðveita sítt trúvirði. Hinvegin tykist lítil áhugi vera fyri tí bleyta øki, ið eitur mentan. Onkur rekur uppundir at byggja mentanarstovnar í staðin fyri tunnlar, men eingin hevur í valstríðnum higartil lagt fram ein yvirskipaðan og visjoneran mentanarpolitikk. Undantakið er tó Miðflokkurin, sum hevur boðað frá, at ókristilig list, hvat tað so enn er, ikki skal stuðlast, og hetta er hóast alt eitt slag av mentanarpolitikki ella kanska skuldi ein sagt umvendum mentanarpolitikki! Mentan og list eru bleytastu partarnir av bleyta økinum, men áhugin hjá flokkunum tykist lítil og eingin, hvør orsøkin so enn kann vera.




# Hvussu skal Høgni bróta ABC-blokkin?



**SÍÐULINJAN**
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*



Føroyska floksskipanin er støðug. So støðug, at endaliga valúrslitið als ikki er tann mest spennandi parturin av valinum. Vit vita framman undan, at teir fýra stóru flokkarnir fáa millum 20 og 25 prosent av atkvøðunum og millum sjey og níggju sessir í tinginum. Endaliga úrslitið fer tí at broyta lítið og einki upp á flokspolitiska býtið. Breiða ABC-samgongan millum Fólkaflokkin, Sambandsflokkin og Javnaðarflokkin kann halda fram, um hon ynskir tað. Og tað kann hon helst gera til ævigar tíðir.

Tí er tað áhugaverda heldur, hvussu kortini verða blandað eftir valið, hvussu flokkarnir fara at telva sínámillum, og hvørjar samgongusamansetingar eru sannlíkar og møguligar. Tað er hetta, sum fjølmiðlarnir í størri mun eiga at fokusera uppá undir valstríðnum. Vit skulu hava greiðari útmeldingar um, hvat flokkarnir ætla sær eftir valið, og hvørji mál eru ultimativ, so vit veljarar kunnu fáa eina hilling á, hvat parlamentariska maskinaríið spýtir út aftur í hinum endanum, eftir at vit hava sett okkara kross við hendan ella handan flokkin.

Ikki tí, at eg droymi um danskar valtilstandir, har sjey flokkar undir hvørjum valstríði verða reduseraðir til ein reyðan og ein bláan blokk alt eftir, hvønn flokkurin peikar á sum forsætisráðharra. Tá kann fjølbroytnið hvørva, sum annars eyðkennir og er ein styrki við eini fleirflokkaskipan.

Men tað hevði kortini verið ynskiligt, um føroysku flokkarnir í størri mun góvu okkum nakrar ábendingar um, hvat teir ímynda sær eftir valið. Og tann mest átrokandi spurningurin er í hesum sambandi, hvussu tann einasti stóri flokkurin úti í kuldanum, Tjóðveldi, ætlar at sleppa inn aftur í hitan í føroyskum politikki.

Kaj Leo Johannesen, Jóannes Eidesgaard, Jørgen Niclasen og onnur umboð í teimum trimum stóru flokkunum hava øll umtalað ABC-samstarvið við positivum lýsingarorðum, síðani valið varð útskrivað. Og teir tykjast allir sinnaðir at halda fram.

Tjóðveldi hevur ongantíð havt løgmann og hevur sitið í andstøðu største partin av tíðini síðani 1946. Í 1998 tvífaldaðist tingmannatalið úr fýra í átta tingsessir á einum rimmar vali, og flokkurin kom í samgongu, inntil samráðingar við donsku stjórnina og at kalla dagliga stríðið við Fólkaflokkin fekk ein enda fyrst í 2004, tá Kallsberg skrivaði út nýval eftir bókina "Skjót journalistin".

Tá Høgni Hoydal á tíðindafundi í seinastu viku varð spurdur, hvussu hann ætlaði at koma aftur í samgongu, hevði hann einki svar. Einki boð uppá, hvussu Tjóðveldi ætlar at telva seg inn aftur í hitan í føroyskum politikki. Einki boð uppá, hvussu flokkurin kann sannføra ein av hinum trimum stóru um, at ABC ikki er einasti møguleikin. Ikki tí, tað trýtur ikki við málum, sum flokkurin kann samstarva við aðrar um, tí allir flokkarnir eru eftirhondini vorðnir samdir um nøkur "pluss-orð", sum verða endurtikin upp í saman í valstríðnum: Útbúgving og gransking, umhvørvi, økt sjálvræði, yvirtøkur, betri atgongd til altjóða samfelagið o.s.fr.

Men spurningurin um, hvussu Høgni og kompaní ætla at bróta ABC-blokkin, er framvegis víðopin. Og samgongumøguleikar eftir valið – heldur enn sjálvt valúrslitið – er tann brennandi spurningurin undan valinum tann 19. januar.

**Á SÍÐULINJUNI gera blaðfólk á Sosialinum viðmerkingar í sambandi við løgtingsvalið.**

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.